# CAPTAIN F

**VODAFONEDEILDIN** Fróði Benjaminsen prógvaði aftur leygardagin, at hann er tann føddi liðskiparin. Hann skeyt tvey mál og gekk undan á sínum liði

Uni Holm Johannesen

| | |
|---|---|
| HB | 3 |
| NSÍ | 2 |

Fróði Benjaminsen er føroyska útgávan av »Captain Fantastic«, sum er eyknevnið hjá Steven Gerrard úr Liverpool.

Tað er eingin í føroysku kappingini, sum stendur manninum við 10-talinum hjá HB kurl.

Var tað ikki staðfest frammanundan, so slóð hann tað rimmarfast við sjeytummaseymi í Gundadali.

Hann líktist aftur hesa ferð burtur úr á vøllinum. Ein sannur vinnari. Stríðshugaður og heilhjartaður á miðvøllinum. Djarvur og rann ongantíð undan mótstøðumonnunum. Krøkti bóltin frá teimum. Maskinmeistarin í maskinrúminum. Øðrvísi enn hinir. Las flytingarmynstrini og renniteinarnar hjá viðleikarunum. Tók ferðina úr spælinum, tá tørvur var á tí. Setti ferð á í umstillingsspælinum. Málsøkin.

Tann føddi liðskiparin.

### Afturhaldin

Fróði Benjaminsen er bersøgin í sínum spæli.

Men tað er hann ikki í viðtalu við fjølmiðlarnar aftaná dystin.

Hann sigur ikki nógv. Ger skjótt av og grundgevur ikki óneyðugt.

Tað tykist ikki sum, at honum dámar at vera í andglettinum. Hann vil helst, at úrslitini tala sína søk.

Tað riggar væl og virðiliga.

### Málini

Fróði Benjaminsen, sum hevur fingið sína uppaling á Svangaskarði á Toftum, gekk undan hjá føroyameistarunum í oddadystinum leygardagin.

Miðvallarin tóktist ikki petti trýstur, tá hann sendi brotssparkið trygt framvið András Gango.

Minuttin undan hvíldini lat hann seg aftur fagna av sínum viðhaldsfólkum. Hann setti rúkandi ferð á bóltin úr 25 metrum, sum fór framvið sakleysa málverjanum og í málið.

Soleiðis snaraði hann úrslitinum á eftir lítlari løtu.

Aftaná hvíldina fór hann í leiklutin sum bóltvinnari. Og aftur royndist hann væl.

### Stóra ávirkan

Fróði Benjaminsen hevur átt høvuðsleiklutin á føroyska fótbóltspallinum í hesum kappingarárinum.

Hann hevur verið betri enn hinir, og tað er ein av orsøkunum, at HB er nú á meistarakós.

Tú veit so at siga altíð, hvat tú fært frá honum. Benjaminsen er sera støðugur í sínum avrikum, og tað er sjáldan, at hann spælir undir sítt støði.

Tað merkist eisini ofta, at mótstøðumenninir hava virðing fyri honum. Annað hvørt sæst tað, tí teir ofta skumpa meira undir hann fyri at steðga honum.

Ella er virðingin so stór, at teir renna nærmast undan.

Aftaná at vunnið nærdystirnar móti Jann Inga Petersen og Justinus R. Hansen, sum stríddust mannliga á miðvøllinum hjá NSÍ, fer hann nú við føroyska landsliðnum til Slovenia, har hann skal takast við enn sterkari mótstøðuleikarar.

Men honum líkt, so ræðist hann neyvan heldur ikki tað uppgávuna.

### Avgerandi hendingar

Tað var serliga aftaná tvær hendingar í dystinum, at NSÍ hevði trupult við at reisa seg.

Runavíkingar vóru á odda, tá Jens Joensen framdi eitt púra óneyðugt brotsspark í fyrra hálvleiki. Bólturin tók í hondina, tá hann púra ótrýstur skuldi sparka leðurkúlina burtur.




*Captain fantastic, Fróði Benjaminsen*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

## FAKTA

**Navn:** Fróði Benjaminsen
**Føðingardagur:** 14. desember í 1977
**Aldur:** 32 ár
**Pláss:** Verja og miðvøllur
**Felag:** HB
**Landsdystir:** 62 dystir
**Mál á landsliðnum:** 3 mál

**Yrkisleið:**
1994: B68, 4 dystir
1995: B68, 10 dystir
1996: B68, 22 dystir / 3 mál,
1997: B68, 24 dystir / 3 mál
1998: B68, 22 dystir / 9 mál
1999: B68, 23 dystir / 4 mál
2000: B68, 18 dystir / 8 mál
2001: B68, 23 dystir / 15 mál
2002: B68, 24 dystir / 5 mál
2003: B68, 23 dystir / 6 mál
2004: Fram Reykjavík, 16 d. / 3 mál
2005: B36, 27 dystir / 7 mál
2006: B36, 23 dystir / 11 mál
2007: B36, 29 dystir / 9 mál
2008: HB, 23 dystir / 6 mál
2009: HB, 29 dystir / 11 mál
2010: HB, 27 dystir / 12 mál
*kelda: www.faroesoccer.com*

## *Viðmerkingar í 3. Hálvleiki:*

- *Vespurnar gloymdu broddin aftur í reiðrinum. Gott, HB.*
- *Frode den gode. Kampe afgør så ofte, han kommer jo fra Tofte. På Tofte kan vi nemlig ikke li' klubben NSÍ.*
- *Heðin Mortensen burdi sett Fróða í starv sum vesputýnari.*
- *HB-liðið er bygt av útlendskum monnum og av bygdamonnum. Fúl skomm av HB at kalla seg havnalið.*
- *Koyr á NSÍ! Tað er í mótgongd, teir sterku vísa karakter. Sterkir, dreingir!*
- *Hann er sterkur í luftini. Hasin har LUFTHANSA.*

## Tveir heimadystir munaðu hjá HB

Tað fer altíð at verða eitt tjak, tá tvey lið møttast tríggjar ferðir í einari landskapping, har annað so hevur heimavøll í tveimum av trimum dystum, hvørt tað er rættvíst ella ikki, at annað liðið fær ein ítróttarligan fyrimun av at verða á heimavølli á tveimum sinnum. HB slapp at møta NSÍ tvær ferðir í Gundadali, og syrgdu HB´arnir fyri at fáa fult í báðum heimadystunum. Tá liðini møttust í fjórða umfari í Gundadali, var NSÍ á odda 1-0, tá 90 minuttir vóru farnir, men í yvirtíðini syrgdu Hendrik Rubeksen og Andrew av Fløtum fyri, at HB fekk øll stigini. 1.000 áskoðarar sóu NSÍ og HB spæla við Løkin í Runavík tann 19. juni. NSÍ sigraði 2-0 við tveimum málum, sum Christian Høgni Jacobsen setti í netið. Leygardagin var tað so aftur HB, sum dróg tað longra stráið við einum 3-2 heimasigri.